Dimmalætting
Leygardagur
Nr. 145 • 119. árgangur • 14. september 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo
— ÁLÍTANDI TÍÐINDI
7 kr.

»Okkara Gulu«

»Viðskerin«

Íslendingar ætla at keypa og virka fisk í Føroyum

Tað er lági fiskaprísurin í Føroyum, ið er orsøkin til, at íslendingar hava fingið hug at keypa og virka fisk í Føroyum. Fyribils hevur ein íslendsk fyritøka, Ísbúð Ltd., kanna møguleikarnar fyri at fáa høli í Fuglafirði, Runavík og í Klaksvík.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Íslendingar, ið umboða fyritøkuna Ísbúð Ltd., halda fiskaprísirnar vera sera lágar í Føroyum. So lágar meta teir prísirnar vera, at teir meta seg kunna gera kvettið. Tí eru teir sinnaðir at leiga ella keypa bygningar, sum kunnu brúkast til flakaskering. Fyribils hava teir fingið í boði ein 700 ferðmetrar stóran bygning í Runavík til endamálið.

Sum skilst er Ísbúð Ltd. í tøttum samstarvi við amerikonsku fyritøkuna Coldwater.

Stjórin á Faroe Seafood, Poul Michelsen, hevur ikki hoyrt um, at Ísbúð Ltd. hevur ætlanir at gera »innrás« í Føroyum. Men hann sigur, at áhugin fyri at koma hendanvegin er stórur.

– Tað eru ikki bara íslendingar, ið vísa hendan áhugan. Áhugin vísir seg úr øllum ættum, sigur Poul Michelsen.

Hann hevur frætt, at ein onnur íslendsk fyritøka, SIF, ið serliga virkar saltfisk, hevur havt ætlanir at virka saltfisk í Føroyum. Hann veit kortini ikki, hvussu langt hesar ætlanir eru komnar.

Poul Michelsen heldur ikki, at fiskaprísirnir eru orsøk til, at so nógvar útlendskar fyritøkur eru sinnaðir at virka fisk í Føroyum. Orsøkin er heldur tann, at samfelagið sum heild liggur í andaleypi. Onki skil er á nøkrum, og ongin veit, hvussu samfelagið kemur burtur úr búskaparligu kreppuni.

– Alt ov lítið skil er í tí heila. Føroyingar hava til dømis ongan møguleika at koma inn á íslendska og norska marknaðin. Men tað vísir seg, at øll kunnu koma hendanvegin, sigur Poul Michelsen.

Hann heldur, at endar tað við, at útlendingar yvirtaka fiskaarbeiðið í Føroyum, so sindrast alt samfelagið.



Regin Vágadal »in action« á Vestanstevnu í summar. Nú skal hann heilt til Mauritius at royna seg móti 23 øðrum um heiti »Heimsins Sterkasti Maður«
Mynd: Jens Kr. Vang

Regin skal nú kappast við heimsins sterkastu

Væleydnaða kappingin í Skotlandi í summar gav Regini Vágadal møguleikan at kappast við aðrar um at gerast heimsins sterkasti maður. Í dag fer hann til Mauritius at kappast við 23 aðrar.

HILMAR JAN HANSEN

Fyrrapartin í dag fer 26 ára gamli, 182 sentimetrar langi og 132 kilo tungi Regin Vágadal av landinum við kós móti oynni Mauritius í indiska havinum eystan fyri Madagaskar.

Har skal Regin kappast við 23 aðrar kempur um at gerast heimsins sterkasti maður.

– Málið hjá mær er at koma víðari til finaluna. Allir 24 luttakararnir eru býttir sundur í fýra bólkar, og tveir úr hvørjum bólki sleppa víðari, sigur Regin, ið annars er rættiliga bjartskygdur undan kappingini, ið er hansara næsta á altjóða stigi.

– Júst nú eri eg so væl fyri, sum eg ikki havi verið fyrr, og haraftrat hóska kappingarnar mær sera væl. Hóast mína støðd eri eg rættiliga kvikur, og tað er ein fyrimunur, tí flestu kappingarnar snúgva seg um at klára ymist innan fyri so stutta tíð sum gjørligt.

Lesið á síðu 7

Flogvøllurin í Vágum kannast

Danska ferðslumálaráðið og landsstýrið hava gjørt av at seta eina nevnd, sum skal kanna møguleikarnar fyri at útbyggja breytina og landingarhjálpitólini á flogvøllinum.

GEORG L. PETERSEN

Tá Jan Trøjborg, danskur ferðslumálaráðharri var á vitjan seinast, var tað millum annað fyri at viðgera eina møguliga útbygging av flogvøllinum í Vágum.

Kjakið kom tó skjótt at snúgva seg um hvar ein nýggjur flogvøllur skal liggja.

Men nú fyriliggur eitt úrslit av vitjanini, sum varð kunngjørt í gjár.

Teir báðir ráðharrarnir, Sámal Petur í Grund og Jan Trøjborg hava avgjørt at seta eina nevnd, sum skal kann møguleikarnir fyri eini útbygging av flogvøllinum í Vágum.

Kanningarnevndin skal í fyrstu syftu kanna møguleikarnar at útbyggja landingarhjálpitólini og breytnetið.

Metingar skulu gerast av kostnaðinum og at gera ein glíðubreyt so reglusemið upp á flogvøllin verður betrað.

Eisini skulu metingar gerast um kostnað, um verandi lendingar– og fráfaringarbreyt við 200 metrum, so hon samanlagt gerst 1450 metrar long.

Maersk Air, Atlantic Airways og Icelandair. Eisini skal nevndion samráðast við donsku verjuleiðsluna.

1. februar 1997 skal kanningin vera liðug.

Lopra fingið 7 mió. aftrat

Tey nítjan oljufeløgini, sum eru saman um boringina í Lopra, hava látið 7 milliónir aftrat til ætlanina í Lopra. Sostatt er fíggjarætlanin víðkað við 25 prosentum.

DIA MIDJORD

Tað tykist sum um boringin í Lopra higartil hevur hepnast stak væl. Í hvussu so er, eru oljufeløgini væl nøgd við úrslitini, tey fáa úr undirgrundini.

Tey nítjan oljufeløgini hava fyri kortum játtað at víðka fíggjarætlanina við 25 prosentum ella 7 milliardum, so boringin kann gjøgnumførast øllum til vildar.

Upprunaætlanin var 28 milliónir krónur, og sostatt er fíggjarætlanin komin upp á 35 milliónir krónur.

Síða 4

Í BLAÐNUM Í DAG

Sjónleikur er hennara lívibreyð

Seinastu árini hevur Birita Mohr havt sjónleik sum sítt yrki í sjónleikabólkinum GRÍMU. Nú er hon aftur á veg upp á pallin við Dario Fo-leikinum »Víðopið hjúnalag«. Vit hava hitt hesa havnarkvinnuna og spurt, hvat fær hana at verða verandi í einum yrki, har smør á breyðið ikki er nøkur sjálvfylgja.

Viðskerin

Aberdeen-leiðin á privatar hendur

Samráðingar eru í løtuni við privatar um at koma upp í eitt partafelag, sum skal røkja siglingina millum Føroyar og Aberdeen. Hetta hendir, nú Teistin er seldur til Italia, og Smyril er settur inn í Suðuroyarsiglingina.

Síða 4

Landsstýrið: Jørleif Kúrberg ikki uppsagdur hetta skúlaárið

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við skúlamálum, kemur at avgera lagnuna hjá Jørleifi Kúrberg. – Talan verður ikki um at siga læraranum upp frá degi til dags. Jørleif arbeiðir sum lærari á skúlanum og verður eisini restina av skúlaárinum, sigur landsstýrismaðurin.

Síða 4

Fleiri umsóknir til stjórastarvið á Fiskamarknaðinum

Mánadagin er seinasta freist at søkja starvið sum stjóri á Fiskamarknaði Føroya. Longu nú hevur nevndin fingið fleiri umsóknir.

Síða 3

Umberto Bossi ætlar at loysa

Leiðarin í italska Liga Nord-flokkinum, Umberto Bossi, ger nú álvara av hóttanunum hjá sær um at gera norðuritalia til eina sjálvstøðuga tjóð, óhefta av Rom. Italski forsætisráðharrin Romano Prodi ávarar Bossi ímóti at gera nakað tilíkt, men Liga Nord-leiðarin letst ikki um vón.

Síða 8

HJÁLP EINUM BARNI !
JA, eg vil geva ___ x 120 kr. um mánaðin so at ___ barn/børn gongur í skúla og fær sjúkratrygging. Mynd, navn og føðingardagur og stutt familjufrágreiðing verða send til mín.
Navn: ___
Adressa: ___
Býur/bygd: ___
Tlf. ___ Send seðilin til:
FØROYSK FILIPPINSK TÆNASTA, Boks 1239, 110 Tórshavn, tlf. 12424

DAGSINS RÆTTUR
MÁNADAG 16.09.: Hakkibuffur v/leyki
TÝSDAG 17.09.: Paprikagrýta
MIKUDAG 18.09.: Rísrætt ella fiskafrikadellur
HÓSDAG 19.09.: Krebinettir
FRÍGGJADAG 20.09.: Eftirgjørd dunna
LEYGARDAG 21.09.: Cordon Bleau
VIKA 38
Perlan

Sólrun Jacobæus, leiðari á Føroya Barnaheimi, hevur verið við til at leggja ársfundin, sum verður í Føroyum í næstu viku, til rættis.

Rúgvusmikil ársfundur um børn og ung

Mánadagin verða rutuflogførini á tremur við fólki, sum skulu taka lut í ársstevnuni hjá donskum stovnum, sum eitt tíðarskeið taka sær av børnum og ungum, ið ikki kunnu búgva heima. 170 luttakarar koma úr Danmark og 27 úr Føroyum. Karmur um ársfundin, sum byrjar mánadagin og endar hóskvøldið, verður Hotel Føroyar.

BEATE L. JENSEN

Mánadagin byrjar ein stórur ársfundur, sum hevur við børn og ung at gera, í Føroyum.

Tað er felagið »Foreningen af Danske Døgninstitutioner for børn og unge«, sum skipar fyri ársfundinum, og sum í tøttum samstarvi við leiðaran á Føroya Barnaheimi, Sólrun Jacobæus, hevur fingið í lag, at fundurin verður hildin í Føroyum hesaferð.

Úr Danmark mánadagin koma 170 luttakarar við Atlantic Airways og Maersk Air, sum greiða flutningin í felag bæði hendavegin og tá luttakararnir friggjadagin skulu heim aftur.

Umframt donsku luttakararnar eru 27 luttakarar úr Føroyum. Hetta er fyri tað mesta umboð fyri barnverndirnar ymsa staðni í landinum.

Gistingarhúsini á tremur

Ráðstevnan fer fram næstan alla næstu viku, frá mánadegi til og við hósdegnum.

Karmur um stóra ársfundin hjá »Foreningen af Danske Døgninstitutioner for børn og unge« verður allar fundardagarnar Hotel Føroyar, har eisini ein partur av luttakarunum skulu gista. Restin gistir á Hotel Hafnia og á Sjómansheiminum í Havn.

Høvuðsheitið á fundinum, sum gongur sum ein reyður tráður allan vegin gjøgnum hesar dagarnar, er Stovns-mentan í Norðurlondum, ið fevnir um teir stovnar, ið taka sær av børnum fulla tíð, ikki dagstovnar, og teirra arbeiði við børnum og ungum.

2 føroyskir fyrilestrahaldarar

Tá tikið verður saman um eftir fundarlok í næstu viku, skal úrslitið, sum kemur burtur hesum, verða grundarlagið undir tí, sum teir á donskum kalla »døgninstitutionskulturens betydning for børns opvækst«.

Umframt danskar fyrilestrarhaldarar, fara bæði Marjun Sigurðsdóttir frá Almannastovuni og Sólrun Jacobæus, leiðari á Føroya Barnaheimi, at greiða frá teimum tilboðum, ið føroyskir stovnar hava at veita børnum, sum styttri ella longri tíðarskeið mugu búgva har.

Hugt at Barbu-umhvørvinum

Um onkur løta verður, tá luttakararnir kunnu taka sær av løttum, verður onkur útferð gjørd, m.a. at hyggja at umhvørvinum, har upptøkurnar til Barbu og harra Pál verða gjørdar í løtuni.

Tá ársfundurin verður settur á Hotel Føroyum mánakvøldið, verður tað landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Axel H. Nolsøe, ið fer at halda røðu.

Feløgini latið 7 mió. kr. aftrat til Lopraætlanina

Tey 19 oljufeløgini, ið hava sligið seg samam um verkætlanina í Lopra, hava váttað, at tey vilja víðkað fíggjarliga partin við 25% av upprunakostnaðinum. Fíggjarætlanin er sostatt vaksin úr 28 upp í 35 milliónir.

DIA MIDJORD

Hvussu teir tulkað upplýsingarnar úr boriholinum í Lopra er ein spurningur. Ein annar spurningur er, hvussu tulka føroyingar tað, at oljufeløgini hava góðkent at víðka fíggjarætlanina 25 prosent, so boringin kann gjøgnumførast øllum til vildar.

Í hvussu so er, eru føroyingar spentir um úrslitið í Lopra. Og tað ger tað ikki minni spennandi, at almenningurin ongar upplýsingar fær frá serfrøðingunum í Lopra.

Arne Rosenkrans Larsen frá Dopas sigur, at oljufeløgini avgjørt eru áhugað í, at boringin verður framd eftir ætlanini.

– Vit hava fyri kortum fingið játtan frá teimum nítjan oljufeløgunum, at tey vilja rinda meirkostnaðin á 7 milliónir krónur, sum tað kemur at kosta, um vit skulu gjøgnumføra boringina øllum til vildar, sigur Arne Rosenkrans Larsen.

Upprunaliga var verkætlanin mett at kosta 28 milliónir krónur.

– At oljufeløgini vilja lata meiri pengar, er ein staðfesting av, at tey vilja hava verkætlanina gjøgnumførda. Annars vildu tey ikki skotið fleiri pengar inn í ætlanina, sigur Arne Rosenkrans Larsen frá Dopas.

Hann sigur víðari, at oljufeløgini eru sera væl nøgd við geologisku upplýsingarnar, sum komnir eru fram í Lopra. Men um middagsleitið í gjár komu ongar upplýsingar um telduna.

– Í løtuni liggur alt stilt, tí í Lopra verður bíðað eftir einum eykaluti. Men so skjótt hesin er komin, byrja vit aftur at bora, sigur Arne Rosenkrans Larsen.



Jørleif Kúrberg: Eg kann ikki gevast uttan uppsøgn

Jørleif Kúrberg, lærari í Sankta Frans skúla, er í eini løgnari støðu. Hann er ikki settur í fast starv sum lærari á skúlanum, og hann er heldur ikki uppsagdur í starvinum, hann hevur havt í møng harrans ár.

DIA MIDJORD

Jørleif Kúrberg møtir í skúlanum um morgnarnar og røkir sína undirvísingaskyldu mótvegis næmingunum, hóast hann ikki hevur fingið løn fyri seinastu tveir mánaðirnar. Men lønina fær hann so í næstum.

– Tá eg ongantíð eri uppsagdur í starvinum, so kann eg ikki bara fara heim, sigur Jørleif Kúrberg.

Lærarin í Sankta Frans skúla heldur mannagongdina í málinum vera so løgna, at hann avgjørt ikki ætlar sær, at málið uttan víðari skal fara aftur við borðinum.

Børnini eru gíslar

Tíverri er tað eingin, sum hugsar um børnini í hesum stríðnum. Allir partar vaska hendur og siga: Eg kann ikki gera nakað við støðuna.

Av ymsum óhepnum orsøkum, so er Jørleif Kúrberg triði flokslærarin hjá einum 7. flokki seinastu fýra árini.

Foreldrini hava tískil mótmælt til avvarðandi myndugleikar. Í skrivi vísa foreldrini ónøgd við, at ein lærari verður settur við skúlaársbyrjan, sum kanska skal úr starvi nakrar vikur seinni. Um so verður, gerast næmingarnir gíslar í einum stríði, sum teir ikki eru partur av.

Dimmalætting hevur tosað við foreldur at børnum í sjeynda flokki, sum hava Jørleif Kúrberg til flokslærara. Sagt verður, at børnini vóru í ómetaliga ringum lag, tá tey í seinastu viku komu heim úr skúlanum. Tey høvdu tá fingið boðini frá flokslæraranum, at hann kanska ikki kom aftur í skúla.

Landsstýrið: Jørleif ikki uppsagdur hetta skúlaárið

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við skúlamálum, kemur at avgera lagnuna hjá Jørleif Kúrberg.

– Talan verður ikki um at siga læraranum upp frá degi til dags. Jørleif arbeiðir sum lærari á skúlanum og verður eisini restina av skúlaárinum, sigur landsstýrismaðurin.

DIA MIDJORD

Landsskúlaráðið hevur havt myndugleikan at seta lærarar í fast starv við føroyska fólkaskúlan. Ein av síðstu samtyktunum hjá ráðnum var, at Jørleif Kúrberg ikki skuldi setast í fast starv eftir grein 40 í lógini. Á ólavsøku kom nýggja ráðharraskipanin í gildi, og Landsskúlaráðið bleiv søga. Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við skúlamálum, hevur nú endaliga orðið í hesum sambandi.

– Tá Jørleif Kúrberg ikki kann vera settur í fast starv eftir grein 40, so má hann fáa ein uppsøgn. Hesa uppsøgnina má eg skriva honum, sigur Eilif Samuelsen.

Kortini verður einki gjørt við málið í løtuni, tí sakførarin hjá Jørleif Kúrberg hevur biðið landsstýrið steðgað við málinum. Sakførarin hevur fingið alt tilfarið í málinum og ynskir at koma við eini skrivligari frágreiðing, ið skal undirbyggja kæruna send er landsstýrinum.

Ikki blakaður út

Eilif Samuelsen sigur víðari, at tað er tann setandi myndugleikin, ið skal loysa læraran úr aftur starvinum.

– Men tað fyriliggur einki prógv, at Jørleif er settur í starv sum lærari, sigur Eilif Samuelsen.

Upp á fyrispurning um landsstýrið ikki kann skera ígjøgnum og koma til eina niðurstøðu, sigur landsstýrismaðurin, at tað verður gjørt so skjótt, sum kæran frá sakføraranum er avgreidd.

– Endaliga støðan verður tikin út frá eini heildarmeting av málinum. Men tað er greitt, at Jørleif fer ikki úr starvinum frá degi til dags. Hann fer í hvussu so er at undirvísa í skúlanum restina av skúlaárinum. Hetta skylda vit læraranum og fyri ein part eisini børnunum, sigur Eilif Samuelsen.



European Business Game

Í dag, leygardagin 14. september 1996, verður farið undir eitt nýtt undirvísingartiltak á øllum miðnámsskúlunum. Undirvísingartiltakið letur samstundis hurðarnar upp fyri nýggjum og øðrvísi samstarvi millum vinnuliv og miðnámsskúlar.

Allir lærarar á miðnámsskúlunum, sum hava áhuga fyri at vera við í nýggja undirvísingartiltakinum, eru í dag saman í hølinum hjá Føroya Banka. Eisini er Mads Peter Villadsen, lærugreinaráðgevi í vinnulívsbúskapi í Danmark, við á fundinum.

Undirvísignartiltakið rópast EBG (European Business Game), og er tað ein verkætlan, sum næmingar á miðnámsskúlunum í bólkum við 3-5 næmingum skulu kappast um við støði í einum góðum vinnulívshugskoti at stovna eina fiktiva fyritøku. Tann besti bólkurin í Føroyum – hann verður funnin í apríl mánaði – fer til europeisku finaluna, sum verður í Bilbao síðst í juni mánaði 1997.

Endamálið við EBG er at geva næmingunum kunnleika um, hvat og hvussu ein skal gera, tá ið farið verður undir at stovna virki. Næmingarnir skulu ígjøgnum ta somu mannagongdina, sum vanligir íverksetarar skulu ígjøgnum; munurin er, at teir hava møguleika at gera feilir, uttan at avleiðingarnar verða óbøtandi. T.d. skulu teir gera fíggjarætlan, gera rakstrarætlan, kanna marknaðin, gera ætlan fyri framleiðslu- og marknaðarførslu og gera joint-venture avtalu við ein EBG-bólk í einum øðrum evropeiskum landi.

Leikluturin hjá vinnulívinum, herundir eisini peningastovnunum, er at geva næmingunum góð og professionell ráð, so teir fáa greiðan kunnleika um tey krøv, sum í dag verða sett einari vælvirkandi fyritøku. Tað tætta samstarvið við vinnulívið skal gera verkætlanina realistiska, samstundis sum hon upp á longri sikt skal elva ungfólki til at fara undir at stovna egna fyritøku.

Í hinum norðurlondum verður í dag innan skúlaskap nógv tosað um, at næmingarnir noyðast at broyta hugburð viðvíkjandi arbeiði. Skúlaskipanin má og skal leggja upp til, at næmingarnir gerast sjálvbjargnir, eisini tá ið tað snýr seg um at útvega sær arbeiði. Teir skulu ikki alast upp til lønmóttakarahugsan. Teir skulu læra, at teir sjálvir kunnu gera nakað, at teir sjálvir kunnu og noyðast at taka egið lív í egnar hendur. Teir skulu ikki venjast við, at onnur skulu loysa teirra problem.

EBG er ein máti at geva næmingunum eina realistiska fatan av, hvussu tað kann lata seg gera sjálvur at fara undir at byrja eina fyritøku við støði í skilagóðum kunnleika um vinnulívið.

Tað er hugagott at síggja, hvussu vinnulív og peningastovnar aktivt stuðla tí ungdómi, sum hevur áræði at ganga nýggjar vinnuvegir. Skulu vit hava gongd aftur á samfelagið, og tað skulu vit, er neyðugt, at ungdómurin fær kunnleika til og áhuga fyri at fara undir vinnulívstiltøk.

Ein stýringarbólkur upp á fýra fólk er settur at samskipa EBG. Í stýringarbólkinum eru limir úr Føroya Arbeiðsgevarafelagi, peningastovnunum, miðnámsskúlunum og Skúlafyrisitingini, upplýsir Claus Reistrup vegna stýrisbólkin í tíðindaskrivi.

EBG-stuðlar í Føroyum eru: Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Banki, Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi.



Stanko
• DREJEBÆNKE
• FRÆSEMASKINER
• SLIBEMASKINER
• BOREMASKINER
• TILBEHØR
SM maskiner & værktøj
Tel. 054 852604
Fax. 054 827776
4800 Nykøbing F